

*Hava veðurmenninir rætt, kemur hendan myndin fleiri ferðir á amerikonsku sjónvarpsskíggjarnar teir næstu mánaðarnar*

# Vænta fleiri ódnir

**Í dag byrjar ódnarárstíðin í Karibiska Havinum, og amerikanarar fyrireika seg til fleiri ódnir enn vanligt**

VEÐRIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Vit vænta, at ódnirnar verða heldur fleiri enn eitt meðalár, sigur veðurgranskarin Philip Klotzbach, sum starvast á lærda háskúlanum í Colorado, og sum hevur granskað tær tropisku ódnirnar, sum á hvørjum ári herja økið við Karibiska Havið og Meksikanska Flógvan.

Hann og aðrir granskarar eru á einum máli um, at fólk í Karibiska Havinum og USA kunnu væntað sær fleiri ódnir í ár enn vanligt. Útrokningar vísa, at roknast kann við ódnarveðri 17 ferðir, og Philip Klotzbach sigur við AP, at tað er 74 prosent sannlíki fyri, at ein ella fleiri ódnir fara at raka amerikonsku strondina.

2005 er ringasta ódnarárið higartil. Tað árið vóru 13 tropiskir stormar og 15 tropiskar ódnir. Ein teirra var "Katrina", sum gjørdi stóran skaða fram við amerikonsku suðurstrondini.




## HANDILSBYGNINGURIN HJÁ FRÓÐA TIL SØLU!

Talan er um handilsbygning, sum liggur Yviri við Strond 3, 100 Tórshavn. Bygningurin er í 3 hæddum. Samlaða gólvvíddin er umleið 730 $m^2$. Grundøkið er umleið 550 $m^2$. Tað er betongdekk millum hæddirnar.

Bygningurin kann t.d. nýtast til skrivstovuhølir og handil.

Bygningurin liggur sera væl fyri og hevur gott útsýni yvir Eystaru Bryggju og Nólsoyarfjørð.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst. Ognin kann síggjast eftir avtalu. Meiri fæst at vita um ognina við at fara inn á heimasíðu okkara www.lawfirm.fo

Áhugaði kunnu venda sær til Inga Højgaard, advokat, fartelefon 511709 og ih@lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS · LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR



## Set ferðslutrygdina í hásæti



**Dagligi leiðarin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd seinastu 14 árini søkir nýggjar avbjóðingar, og tí leitar ráðið nú eftir nýggjum stjóra at standa á odda fyri arbeiðinum.**

**Umframt av hava**
- leiðaraevni
- samskiftingarevni og
- samskipanarevni

**skal stjórin eisini**
- vera kreativ/ur
- hava skapanargleði
- kunna hugfanga/engasjera seg fult fyri arbeiðinum hjá RFF
- eiga evni til at gera hugskot til veruleika, og ikki minst
- hava tev fyri eggjandi og upplýsandi marknaðarføring

**Uppgávurnar hjá stjóranum eru m.a.**
- at vera ígongdsetari
- at vera verkætlanarleiðari, og leiða fleiri verkætlanir samstundis
- at savna og uppbyggja fakliga vitan til virkna nýtslu í samfelagnum
- at samstarva við myndugleikar, stovnar, feløg, fyritøkur og einstaklingar um at virka fyri at betra um ferðslutrygdina
- at vera til reiðar sum persónur at trína fram at umboða sjónarmið RFF's

**Førleikar**
Tú hevur hóskandi útbúgving, har leiðsla, samskifti og førleiki at brúka framkomnar samskiftis- og kunningarhættir eru nakrir av hornasteinunum

Vit vænta, at tú hevur sterkar persónligar eginleikar, so sum arbeiðssemi, dynamikk og skapanarlyndi. Tú kennir føroyska samfelagið væl, og hevur skil fyri hvat ið rørist millum fólk. Tú dugir væl við fólki – høgum sum lágum, ungum sum eldri – og samskiftir skilliga bæði á føroyskum, skandinaviskum og enskum

Løn sambært avtalu

**Umsókn**
Heldur tú teg vera rætti persónur at røkja starvið, skalt tú senda umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi mánadagin 18. juni 2007. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jón Kragesteen á telefon 210204 ella til Høgna í Stórustovu, starvsnevndarformann, á telefon 215510.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknirnar, merktar »Umsókn til stjóra fyri RFF« á brævbjálvanum kunnu sendast til:

**Advokatvirkið**
Boks 85
FO-110 Tórshavn

ella við telduposti til starvsnevndarformannin
his@post.olivant.fo

Ráðið fyri Ferðslutrygd varð stovnað í 1976, og endamálið er at virka fyri tryggari ferðslu. Ovasti myndugleiki hjá ráðnum er ráðsfundurin, sum verður hildin á hvørjum ári í apríl mánaði. Ráðsfundurin velur eina starvsnevnd við 5 fólkum, sum í tøttum samstarvi við stjóran setir út í kortið tey mál og mið, sum arbeiðast skal við.

Umframt stjóran er skrivstovufólk og fólk, sum arbeiða við útvaldum uppgávum. Meira kunning er at síggja á www.ferdslutrygd.fo